# Kenslur á palli



Hetta var fyrstu fer at Hanna Isaksen luttók í tiltakinum Ung í Føroyum. Hon og nakrar vinkonur teknaðu seg til sjónleik hjá Mikkjali Helmsdal, og hetta dámdi henni sera væl. Henni dámar væl at spæla sjónleik, at royna okkurt øðrvísi og at spæla ein heilt annan persón. Hon hevur luttikið í sjónleiki í skúlanum, og í einum leiki, sum hon og felagskórsangarnir gjørdu til nýggjárið í fjør.

Hanna teknaði seg til Ung í Føroyum, fyri at læra meira um sjónleik, og at læra betur at spæla. Fyri at útvikla seg í sjónleiki, og fyri at uppliva nakað nýtt.

- Mær dámar sera væl máta, Mikkjal lærir okkum uppá. Vit skulu til dømis ganga á pallinum har vit vísa ymsar kenslur, millum annað vera óð, glað, forvitin, syrgin o.s.fr. Hetta lærdu vit sera nógv av, sigur Hanna. Tey trenaðu ikki beinleiðis ein leik, men skuldu læra at spæla aðrar persónar, áðrenn tey fóru í holt við ein leik. Men tey framførdu eina stutta framførslu, tá almenningurin kundi koma at hyggja.

Tey vóru átta í sjónleikaverksmiðjuni, og har var sera góður stemmningur í millum tey øll, og tey smæddust als ikki fyri hvørjum øðrum, meðan tey spældu.

- Jú, eg hevði avgjørt kunnað hugsað mær at verið við aftur næsta ár, sigur Hanna smílandi.

# Á fotoverksmiðjuni



Hetta er aðru ferð, at Kristina Heinesen er við í tiltakinum Ung í Føroyum. Hesuferð meldaði hon seg til Foto, har Amy Hansen var verksmiðjuleiðari.

Har dámdi henni ómetaliga væl at taka myndir, og so at arbeiða við teimum aftaná. Hon hevur ikki tikið nakað serligt av myndum áðrenn, so hetta er fyri at læra. Hon teknaði seg til tiltakið mest fyri at fáa eitt upplivilsi, og at prøva naka nýtt, og møta nýggjum fólki.

Tey eru níggju, ið hava meldað seg til fotoverksmiðjuna, men tað eru ofta tvey og tvey, ið arbeiða saman, so tað er ymiskt hvørjum man arbeiðir saman við.

Kristina sigur, at stemningurin í bólkinum var sera góður, og tey vóru ikki smæðin, tá ið tað skuldi takast mynd av teimum.

Tey høvdu eisini sera fríar teymar og tóku myndir, sum tey høvdu hug. Tóku av hvørjum øðrum, og úti í natúrini.

Kristina fer avgjørt at luttaka aftur í Ung í Føroyum.

### Dýrt frítíðarítriv

Amy Hansen, sum sjálv er fotografur, var rættiliga ovfarin av, at tey ungu komu so skjótt eftir teimum ymsu teknikkunum í myndatøku.

- Tey hava jú onga royndir við at arbeiða við røttu útgerðini, tí her í Føroyum hava tey ikki møguleika at velja foto í skúlanum. Og tað eru fá, sum hava ráð til at keypa sær útgerð til at eksperimentera við sjálvi, sigur Amy og leggur afturat, at av tí at hetta frítíðarítrivið er so dýrt, má man helst vera rættiliga vísur í, at man fer at tíma tað, áðrenn man byrjar at keypa útgerðina.

Og tað kann man sjálvandi bara vita, um man sleppur at royna tað — til dømis á fotoverksmiðjuni á Ung í Føroyum saman við einum sera dugnaligum vegleiðara.



*Hallur, Birna og John*

# "Systkini" halda skil á

Runt um í Mentanarhúsinum sóðust nøkur ung fólk, sum sóðu eitt sindur ov gomul út til at vera luttakarar. Hetta vóru tey sokallaðu "systkini" hjá Ung í Føroyum

- Vit eru vorðin ov gomul til Ung í Føroyum, so tá vit ikki sleppa at vera við longur, hjálpa vit til í staðin fyri, sigur John S. Jacobsen, sum sjálvur hevur ver-ið við á trimum Ung í Føroyum stevnum. John hevði ikki ímyndað sær, at tað var so nógv at halda skil á til eitt sovorðið tiltak.

- Tað sær eitt sindur øðrvísi út nú, man stendur "hinumegin" - Vit gjørdu okkum í hvussu er ikki nógvar tankar um, hvør tað var, sum fekk alt at hanga saman, tá vit sjálvi vóru við, sigur John, sum verður avbrotin av telefonini, tí onkur skal vita okkurt um, nær almenningurin kann koma at forvitnast.

Inni í køkinum hitta vit tvey onnur systkin, Hallur Helmsdal og Birnu Heinesen, sum rokast við at skera franskbreyð, kuta kinakál og annars gera nátturan kláran.

- Ja, tað skal nógv franskbreyð til 40 svong ung fólk, sigur Hallur, sum heldur tað vera fínasta slag at hava leiklutin sum systkin, og hevur onki ímóti at vaska upp, meðan tey ungu hugna sær.

- Vit hava prøvað tað, so nú er tað teirra túrur, sigur John og tekur enn eitt franskbreyð upp úr eini eskju.

Birna er farin í holt við eitt kinakál, meðan hon greiðir frá, at tá tey ikki standa í køkinum, ganga tey runt við einum upptøkutóli og gera ein dokumentarfilm av stevnuni.

- Tað er rættiliga spennandi at práta við luttakarnar um, hvat tey takast við og fylgja teimum hesar dagarnar, so eg eri rættiliga spent uppá hendan filmin nú, sigur Birna.









Til ber at fylgja Ung í Føroyum
á heimasíðuni
www.ungiforoyum.info



*Búi, Astrið og Tinna*

# Á tónlistaverksmiðjuni

Búi hevur altíð havt sera góðan áhuga í tónleiki, so hann sá tiltakið, Ung í Føroyum, sum ein sera góðan møðuleika fyri at menna seg í tónleiki. Búi spælir guitar, og skrivar sjálvur løg, men vil fegin læra meira innan tónleik.

Verksmiðjuleiðarir vóru Kári Sverrison og Jóhannes Steingrund. Teir gjørdu løg og sangir, saman við lutakaranum, og lærdu tey um ljóðteknikk, hvussu tað gongur fyri seg á pallinum, tá ljóðroyndir skulu gerast.

Tað vóru tíggju, ið høvdu teknað seg til tónleika verksmiðjuna, sum var býtt upp í rock, klassiskt, og har øll gera sang sjálvi. Tey vóru ikki bundin at einum ávísum sangi, men sluppu sjálvi at avgera, hvat tey spældu.

Um tað var nakað, ið Búi hevði viljað var annaðleiðis, so var tað tað, at tey fingu longri tíð, men Búi verður uttan iva aftur at síggja á Ung í Føroyum næsta ár.

### Spennandi at improvisera

Á verksmiðjuni hjá tónleikarnum hittu vit eisini Astrið G. Simonsen og Tinnu Tótadóttir, sum báðar eru 13 ár. Astrið er úr Havn og hevur spælt cello í eini 5-6 ár, meðan Tinna úr Runavík byrjaði at spæla klaver fyri trimum árum síðani. Tær hava báðar vant á musikskúla ella kvøldskúla, men hesuferð hildu tær báðar tað vera serliga stuttligt at sleppa at spæla saman við tónleikarum, tær ikki kendu frammanundan. Teimum hevur eisini dámað avbera væl at sleppa at improvisera sjálvar og at spæla longið út í eitt, sjálvt um tað hevur verið rættiliga strævið onkrar løtur. Fáa tær møguleikan, ivast Astrið og Tinna ikki í, at tær fara at vera við á Ung í Føroyum aftur næsta ár.